# 1 Fjølmiðlaumrøða og sáttmálaviðurskifti hjá Tyrlutænastuni

Í uppriti í oktober mánaði 2007 greiddi Landsgrannskoðanin frá umrøðuni í fjølmiðlunum, har m.a. varð víst á, at serútgjørda bjargingartyrlan, ið Fiskimálaráðið hevur sáttmála við Atlantic Airways um, hevði verið leigað út til virksemi uttanlands eitt ávíst tíðarskeið í 2007. Landsgrannskoðanin helt, at tað tóktist vera í stríð við sáttmálan. Landsgrannskoðanin hevði gjøgnumgingið sáttmálarnar millum Atlantic Airways og Fiskimálaráðið og Innlendismálaráðið um ávikavist bjarging og flutning (sjá fylgiskjal 1 og 2).

# 2 Umrøðan í fjølmiðlunum av tyrlutænastuni

Í august 2007 varð tyrlutænastan, sum Atlantic Airways veitir landinum, umrødd í m.a. Sjónvarpi Føroya og í Dimmalætting. Niðanfyri taka vit samanum nakað av tí, ið varð ført fram.

## 2.1 Tíðindasendingin “Dagur & vika” 27. august 2007

***Gongdin at dagføra sáttmálan “um leiting & bjarging”***

Í tíðindasendingini 27. august 2007 greiddi Sjónvarpið frá, at tey høvdu fingið innlit í málið um sáttmálan millum Fiskimálaráðið og Atlantic Airways um leiting & bjarging.

Sjónvarpið greiddi m.a. frá, at Fiskimálaráðið hevði í eitt ár arbeitt við at dagføra sáttmálan við Atlantic Airways. Í oktober 2006 hevði aðalstjórin í Fiskimálaráðnum biðið um at fáa eina frágreiðing um málið, og sagt varð frá, at aðalstjórin helt málið hava skund. Fiskimálaráðið vildi m.a. hava eina eftirmeting av, hvat ráðið fekk fyri sáttmálasamsýningina. Víst varð á, at sáttmálin var ógreiður, og at tað kundi kosta mannalív.

Á fundi nakað seinni (helst í november 2006) við m.a. Fiskiveiðieftirlitið kom fram, at Fiskiveiðieftirlitið vildi hava, at ásetingin í sáttmálanum um, at bjargingartyrlan skuldi verða klár innan fyri 1 tíma (§ 4 í sáttmálanum), skuldi verða broytt til ½ tíma. Tá ið fólk liggja í køldum sjógvi, er tíðin umráðandi.

Sambært tíðindasendingini skuldi stjórin á Fiskiveiðieftirlitinum á fundi í mars 2007 hava víst á, at Fiskimálaráðið kundi verða illa fyri, hendi ein vanlukka, og eingin tyrla var tøk. Stjórin skal hava víst á, at sáttmálin um leiting & bjarging var illa orðaður.

Landsstýrismaðurin skal í mars 2007 hava biðið um, at okkurt verður gjørt, og í apríl 2007 hevði hann biðið um, at Fiskimálaráðið tók upp samband við Atlantic Airways um sáttmálaviðurskiftini. Sambært Degi & viku hendi einki aftur í málinum, fyrrenn Sjónvarpið í august 2007 vísti á, at Bell 412 (bjargingartyrlan) arbeiddi í frálandavinnu í Norðsjónum.

***Eru tyrlurnar tøkar?***

Í tíðindasendingini varð greitt frá, at í mars 2007 var Bell 212 tyrlan í Onglandi og arbeiddi í frálandavinnu har, og í august 2007 arbeiddi Bell 412 í frálandavinnu í Norðsjónum. (Greitt varð ikki frá í tíðindasendingini, hvussu leingi tyrlurnar arbeiddu uttanlands og harvið ikki vóru tøkar í Føroyum.)

Í tíðindasendingini varð nevnt, at Atlantic Airways hevði gjørt eina avtalu við BP í Hetlandi um, at ein tyrla frá teimum kundi verða klár/ella í Føroyum innan fyri 2 tímar.

## 2.2 Greinir í Dimmalætting

Í blaðnum 17. august 2007 hevur Dimmalætting 4 greinir um tyrlutænastuna, sum Atlantic Airways veitir landinum (sjá fylgiskjal 3). Niðanfyri umrøða vit tríggjar blaðgreinir. Evnini, sum verða viðgjørd eru:

- hvussu nógvar tyrlur landið kann krevja sambært sáttmálanum um leiting & bjarging,
- hvør tyrla skal vera tøk.

***Greinin: "Skulu vera tvær tyrlur alt árið"***

Í greinini vísir greinaskrivarin til løgmansrøðuna frá 2001. Greinaskrivarin vísir á, at sambært táverandi løgmanni, Anfinni Kallsberg, var eingin ivi um, at tvær tyrlur skuldu vera tilbúnar alt árið.

Løgmaður segði m.a. í løgmansrøðuni 2001, at keypt var ein nýggj tyrla við nýmótans leiti- og bjargingarútgerð, ið rakk um alt føroyska sjóøkið, og ein skipan við útbúnum "bjargarum" og við læknum var eisini fyrireikað. Alt árið skuldu tvær tyrlur verða tøkar til hesa tænastuna.

Greinaskrivarin staðfestir, at ætlanin við løgtingslógini um tyrlutænastu, Ll. nr. 127/2000, var, at tvær tyrlur skuldu vera tøkar alt árið. Greinaskrivarin vísir tó á, at lógin og sáttmálin við Atlantic Airways eru nakað leyst orðað.

Í somu grein er samrøða við stjóran á Atlantic Airways, sum vísir á, at sáttmáli ongantíð er gjørdur fyri meira enn eina tyrlu. Sambært stjóranum er avtalan, at ein tyrla skal vera tøk, og so leingi sum Atlantic Airways hevur ræði á Bell 212, kann hon vera backup.

Stjórin vísir eisini á, at nýggja tyrlan, Bell 412, mátti fara at flúgva fyri Bristow, tí Atlantic Airways mátti gera eina installering í Bell 212 tyrluna, so hon livdi upp til krøvini frá Bristow.

At enda í samrøðuni vísir stjórin á, at ynskir landið at hava tvær tyrlur konsekvent, má Atlantic Airways meta um, hvat tað kostar, og koma við einum tilboði. "Teir fáa hvat sum helst, bara tað er samsvari millum tænastuna og tað, sum vit fáa afturfyri."

***Greinin: "Landið ikki krav upp á tvær tyrlur"***

Í greinini verður greitt frá, at løgfrøðilig kanning í Fiskimálaráðnum staðfestir, at MRCC (Sjóbjargingarstøðin/tilbúgvingin) kann ikki krevja tvær tyrlur tøkar. Tað verður lagt afturat, at MRCC kann krevja eina tyrlu, men tað er ikki nærri tilskilað í løgfrøðiligu kanningini hjá Fiskimálaráðnum, hvør tyrla talan skal vera um.

***Greinin: "Bristow kundi ikki nýta gomlu tyrluna"***

Sum Landsgrannskoðanin skilir tað, so er Bristow ein tyrlufyritøka, Atlantic Airways hevur samstarvað við í fleiri ár (síðani 2000), herímillum eisini tá ið oljuleitivirksemi hevur verið í føroyskum sjóøki. Allarhelst hevur samstarvið havt við sær, at Atlantic Airways hevur fingið uppgávur at loysa fyri Bristow uttan fyri Føroyar.

Í innganginum til greinina stendur, at "Tyrludeildin hjá Bristow kundi ikki nýta gomlu tyrluna, sum Føroya fólk hevur livað við í tveir mánaðir."

Sambært umboðnum hjá Bristow livdi Bell 212 tyrlan (til millumoyggjaflúgving) ikki upp til trygdarkrøvini hjá felagnum, og Bristow kravdi tí eina nýggjari tyrlu.

Í greinini verður greitt frá, at munur er á Bell 412 (nýggju bjargingartyrluni) og Bell 212 tyrlunum hjá Atlantic Airways. Tann nýggja flýgur longri og skjótari. Nýggja tyrlan er ein bjargingartyrla – hon hevur m.a. hitasøkjandi tól.

Greitt verður frá, at Føroya fólk í 2 mánaðir hevur livað við, at bert Bell 212 tyrlan hevur verið tøk til bjarging í Føroyum. Greinaskrivarin vísir á, at landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum 16. august 2007 hevði sagt við "Dag & viku", at Bell 412 tyrlan skuldi verða aftur í Føroyum 17. august 2007. Bell 412 (bjargingartyrlan) hevur tí helst verið uttanlands frá juni til august 2007.

Greinaskrivarin vísir á samrøðu, sum "Dagur og vika" 16. august 2007 hevði við stjóran á Atlantic Airways, sum hevði víst á, at samsýningin sambært sáttmálanum um leiting & bjarging var fyri eina tyrlu. Stjórin segði, at var onnur tyrlan ikki tøk, so "stillar Atlantic Airways upp við aðrari tyrlu".

Greinaskrivarin vísir á, at bert ein tyrla hevur verið tøk higartil í ár, og seinastu tveir mánaðirnar hevur bert verið talan um gomlu tyrluna (Bell 212), ið ikki er ein bjargingartyrla.

# 3 Sáttmálarnir við Landsstýrið um tyrluflúgving

Tveir sáttmálar eru millum Landsstýrið og Atlantic Airways um tyrluflúgving. Annar sáttmálin er millum Fiskimálaráðið og Atlantic Airways um leiting & bjarging o.a., og hin sáttmálin er við Strandfaraskip Landsins (Innlendismálaráðið) um millumoyggja flúgving o.a.

Sáttmálarnir galda fyri sama tíðarskeið, og teir hava ymiskar ásetingar við atliti at roknskaparframløgu, endurskoðan av samsýning o.s.fr. Niðanfyri verða nakrar av ásetingunum umrøddar og samanbornar.

## 3.1 Tíðarskeið, uppathald og endurskoðan av sáttmálunum

### Sáttmálin um leiting & bjarging

7. februar 2001 skrivaðu Fiskimálaráðið og Atlantic Airways undir sáttmála "um tyrlutænastu", galdandi frá 1. januar 2001 til 31. desember 2010. Sambært § 12, stk. 2, kunnu partarnir tó frá 1. januar 2003 eina ferð um árið biðja um samráðingar fyri at endurskoða sáttmálan.

Í § 12, stk. 3, er ásett, at Fiskimálaráðið skrivliga kann siga samstarvið við Atlantic Airways upp við 12 mánaða fyrivarningi. Ger Fiskimálaráðið av at siga samstarvið upp, hevur ráðið, vísandi til § 15, skyldu at keypa nýútvegaðu tyrluna fyri handilsvirðið, tó í minsta lagi bókað virði.

Í § 12, stk. 4, eru ásetingar fyri, um at sáttmálin kann halda fram. Vil Fiskimálaráðið, at sáttmálin heldur fram, kann Atlantic Airways halda fram við verandi sáttmála ella biðja um samráðingar um nýggja árliga samsýning sambært § 6, stk. 1, og § 7, stk. 3. Verða partarnir ikki samdir um samsýningina, kann Atlantic Airways annaðhvørt siga sáttmálan upp við 12 mánaða varningi ella lata samsýningina verða ásetta av gerðarrætti, sambært § 11. Ógreitt er, um Fiskimálaráðið hevur skyldu at keypa tyrluna, sigur Atlantic Airways sáttmálan upp sambært § 12, stk. 4.

Sambært § 16, hevur Fiskimálaráðið til 31. desember 2010 forkeypsrætt til tyrluna til tann keypsprís, sum prógvfast verður bjóðaður av triðjamanni.

**Sáttmáli um millumoyggjaflúgving**

Í 1996 gjørdi Atlantic Airways sáttmála við Landsstýrið (nú Innlendismálaráðið) um at veita Landsstýrinum tyrlutænastu sambært galdandi ferðaætlan, umframt SAR (Search and Rescue). Sáttmálin fór úr gildi 1. mars 2003. Endamálið við uppsøgnini av sáttmálanum var at dagføra hann. M.a. skuldu SAR-uppgávurnar ikki verða partur av endurskoðaða sáttmálanum, tí tær uppgávurnar eru fevndar av sáttmálanum, sum Atlantic Airways hevur gjørt við Fiskimálaráðið.

Í desember 2005 skrivaðu Innlendismálaráðið og Atlantic Airways undir nýggjan sáttmála um tyrluflúgving, sum fekk gildi 1. juli 2005. Sambært § 10, stk. 1, kann sáttmálin í fyrsta lagi fara úr gildi 31. desember 2008.

Sambært § 10, stk. 2, kann annar parturin, sum vil siga sáttmálan upp til 31. desember 2008, lata hinum partinum skrivliga uppsøgn í seinasta lagi 6 mánaðir frammanundan. Eftir 31. desember 2008 kunnu báðir partar siga sáttmálan upp til ein 1. januar, við 6 mánaða varningi.

## 3.2 Avhendan av rættindum og skyldum sambært sáttmála

Í ávikavist § 13 í sáttmálanum um leiting & bjarging og § 5 í sáttmálanum um millumoyggjaflúgving er ásett, at Atlantic Airways kann avhenda rættindi og skyldur sambært sáttmálanum til dóttirfelag ella annað felag, sum Fiskimálaráðið hevur góðkent.

## 3.3 Veiting av tænastu

Sambært § 1 í sáttmálanum um leiting & bjarging átekur Atlantic Airways sær at veita Fiskimálaráðnum tænastur viðvíkjandi leiting & bjarging o.a., vísandi til fylgiskjal 1 til sáttmálan.

Sambært § 1 í sáttmálanum um millumoyggjaflúgving átekur Atlantic Airways sær at reka tyrluna hjá Landsstýrinum.

## 3.4 Tyrlur at nýta til tyrlutænastuna

Sambært § 1, stk. 2, í sáttmálanum um leiting & bjarging skal Atlantic Airways útvega sær eina miðalstóra, serútgjørda tyrlu, vísandi til fylgiskjal 2 til sáttmálan. Sambært § 8 í sáttmálanum um leiting & bjarging er tað tó Fiskimálaráðið, ið útvegar og eigur serútgerðina til nýútvegaðu tyrluna, sí fylgiskjal 2. Tað kann tí tykjast, sum at Atlantic Airways bert hevur útvegað eina miðalstóra tyrlu.

Í frágreiðing í desember 2001 til Fiskimálaráðið vísti Landsgrannskoðanin á, at landið rindar allar útreiðslur, og harafturat rentur og avdráttir av láninum, í sáttmálaskeiðnum. Eftir 10 árum (sáttmálaskeiðið) hevur landið rindað ein stóran part av kostnaðinum fyri tyrluna, umframt viðlíkahald.

Landsgrannskoðarin heldur, at tá tað í sáttmálanum stendur, at Atlantic Airways skal útvega sær eina miðalstóra, serútgjørda tyrlu, og specifikatiónirnar fyri tyrluna eru settar í fylgiskjal 2 til sáttmálan, umframt at landið rindar allar útreiðslur, rakstrarligar sum fíggjarligar, kann neyvan nakar ivi vera um, at landið við sáttmálanum um leiting og bjarging kann krevja, at sáttmálin umfatar nýggju serútgjørdu tyrluna.

Sambært § 2 í sáttmálanum um millumoyggjaflúgving letur Landsstýrið sína tyrlu (Bell 212), saman við eykalutum, vørugoymslu o.ø. til Atlantic Airways at nýta.

Í 2006 hevur Landsstýrið við løgtingslóg nr. 37 frá 9. mai 2006 skotið tyrluna (Bell 212) og eykalutagoymsluna inn í Atlantic Airways sum apportinnskot. Tyrlan (5,2 mió.kr) og eykalutagoymslan (2,9 mió.kr) eru skrásett í fíggjarstøðuni í tyrluroknskapinum 2006, og eru tí ikki ogn landsstýrisins longur.

Landsgrannskoðanin hevur í oktober 2007 gjørt vart við, at tørvur er á at dagføra §§ 1 og 2 í sáttmálanum um millumoyggjaflúgving, tí tyrlan og eykalutagoymslan nú er ogn hjá Atlantic Airways.

## 3.5 Raðfesting av uppgávum, og neyðætlan

### Raðfesting av uppgávum

Í § 2 um raðfesting av uppgávum í sáttmálanum um leiting & bjarging er ásett, at Atlantic Airways hevur rætt til at nýta tyrluna (Bell 412) til aðrar uppgávur við Føroyum sum støð, tó soleiðis, at tyrluflúgving sambært hesum sáttmála hevur forrætt.

Í § 3, stk. 4, í sáttmálanum um millumoyggjaflúgving er ásett, at Atlantic Airways hevur rætt at nýta tyrluna (Bell 212) til aðrar uppgávur við Føroyum sum støð, tó hevur millumoyggjaflúgvingin altíð forrætt, undantikið tá ið flogið verður í sambandi við neyðstøðu.

Báðir sáttmálarnir siga sostatt, at Atlantic Airways hevur rættin at nýta báðar tyrlurnar til annað arbeiði, men treytin er, at arbeiðini skulu verða gjørd við Føroyum sum støð.

Tá ið tað í hvørgum sáttmálanum stendur nakað um, at tyrlurnar kunnu verða nýttar til arbeiði uttanlands, og báðar tyrlurnar skulu hava støð í Føroyum í sambandi við onnur arbeiði, heldur Landsgrannskoðanin, at Atlantic Airways kann ikki reka virksemi uttanlands við Bell 412 og Bell 212.

Landsgrannskoðanin hevur í skrivi 4. oktober 2007 spurt Fiskimálaráðið, um tað er í tráð við ásetingina í § 3, stk. 4, í sáttmálanum um millumoyggjaflúgving, hvat ið Bell 212 tyrlan kann verða nýtt til. Somuleiðis varð spurt í sama skrivi um tað er í tráð við ásetingina í § 2, í sáttmálanum um leiting og bjarging, hvat ið Bell 412 tyrlan kann verða nýtt til [1].

Fiskimálaráðið er av teirri áskoðan, at tilbúgvingin byggir á, at bæði Bell 412 og Bell 212 hava støð í Føroyum. Fiskimálaráðið hevur gjørt bæði Innlendismálaráðnum og Atlantic Airways greitt í skrivum ávikavist 29. august 2007 og 24. september 2007, at Bell 212 eisini er partur av tilbúgvingini.

Løgmálaráðið heldur í skrivi til Fiskimálaráðið 13. september 2007, at sáttmálin millum Strandfaraskip Landsins og Atlantic Airways kann ikki verða grundarlag fyri einum kravi um, at Bell 212 skal hava støð í Føroyum, og áleggur ikki Atlantic Airways at røkja tyrluflúgvingina við Bell 212.

Landsgrannskoðanin skilur støðuna soleiðis, at tilbúgvingin fevnir um tvær tyrlur, har Fiskimálaráðið kann krevja serútgjørdu tyrluna til útkall, og at næsta tyrlan skal vera tøk um so er, at Bell 412 ikki er í rakstri.

### Neyðætlan

Í § 3 í sáttmálanum um leiting & bjarging er ásett:

[1] Fylgiskjal 4, sp. 6) og 7)

> *"Um so er, at tyrlan (nýggja Bell 412) ikki er í rakstri, skal Atlantsflog beinanvegin geva fráboðan um fyriliggjandi støðu, og nær tyrlan væntandi verður í rakstri aftur, hetta sum nærri tilskilað í fylgiskjali 1. Í slíkum føri átekur Atlantsflog sær at hava verandi Bell 212 tyrluna tøka..."*

Landsgrannskoðanin hevur í skrivi í oktober 2007[2] spurt Fiskimálaráðið, hvussu Ráðið tulkar orðingina um, at tyrlan ikki er í rakstri. Fiskimálaráðið hevur svarað, at er tyrlan ikki í rakstri, er hon til umvælingar ella til eftirlit, og er ikki leigað út til annað virksemi.

Tað samsvarar við fylgiskjal 1 til sáttmálan millum Fiskimálastýrið og Atlantic Airways frá februar 2001 sum sigur:

> *"Um bjargingartyrlan ikki er operativ, til umvælingar o.a., tá skal AA fráboða MRCC um fyriliggjandi støðu og nær tyrlan aftur kann væntast at verða operativ."*

Um neyðætlan stendur víðari í § 3 í sáttmálanum um leiting og bjarging:

> *Um so er, at Bell 212 tyrlan heldur ikki er tøk, skulu Atlantsflog og Fiskimálaráðið í felag finna aðra loysn á tyrlutilbúgvingini, til onnur tyrlan er tøk aftur."*

Hendir tað, at hvørgin tyrlan er tøk, skulu Atlantic Airways og Fiskimálaráðið sostatt í felag finna aðra loysn á tyrlutilbúgvingini, til onnur Bell tyrlan er tøk aftur. Í svari til Landsgrannskoðanina um hvør rindar fyri møguligar eykaútreiðslur av hesari loysn[3] sigur Fiskimálaráðið, at býtið av eyka útreiðslum verður ein partur av avtaluni um aðra loysn. Lagt verður afturat, at hugsast kann, at Fiskimálaráðið fer at krevja aðra tyrlu leigaða fyri kostnað hjá Atlantic Ariways, hetta um talan er um longri tíðarskeið, og sagt kann vera, at Atlantic Airways hevur misrøkt sínar skyldur.

Landsgrannskoðanin hevur í oktober 2007[4] spurt Fiskimálaráðið, hvussu tað tryggjar sær, at bjargingartyrlan – ella onnur hóskandi loysn – er tøk, tá ið tørvur er á henni. Fiskimálaráðið hevur í sínum svari víst á, at Atlantic Airways hevur játtað, at Bell 412 bara verður nýtt til aðrar uppgávur, um tað ikki nervar tilbúgvingina.

Í Degi & Viku frá 27. august 2007 verður greitt frá, at í mars 2007 var Bell 212 tyrlan í Onglandi og arbeiddi í frálandavinnu har, og í august 2007 var Bell 412 og arbeiddi í frálandavinnu í Norðsjónum. Einki varð sagt um, hvussu langt tíðarskeið talan var um. Í tíðindasendingini kom eisini fram, at Atlantic Airways hevði gjørt eina avtalu við BP í Hetlandi um, at ein tyrla frá teimum kundi verða klár/ella í Føroyum innan fyri 2 tímar.

Landsgrannskoðanin hevur spurt Fiskimálaráðið um kostnaðin av hesari neyðætlan,[5] um neyðætlanin er í tráð við § 4 í sáttmálanum um leiting og bjarging og um loysnin er nøktandi.

Fiskimálaráðið svaraði í juli 2008, at Atlantic Airways hevur borið kostnaðin av neyðætlanini[6], at útreiðslan er Fiskimálaráðnum óviðkomandi[7] og svarar víðari:

> *"Fiskimálaráðið heldur ikki, at hendan loysn kann vera nøktandi, og hevur skrivliga gjørt vart við tað yvirfyri Atlantic Airways og Innlendismálaráðnum."*

---

[2] Fylgiskjal 4, sp. 1) og 2)
[3] Fylgiskjal 4, sp. 2)
[4] Fylgiskjal 4, sp. 9)
[5] Fylgiskjal 4
[6] Fylgiskjal 4, svar 3
[7] Fylgiskjal 4, svar 5

***Umrøða í fjølmiðlunum av sáttmálanum um leiting & bjarging***

Í Degi & viku 27. august 2007, varð sagt, at Fiskimálaráðið í eitt ár hevði arbeitt við at dagføra sáttmálan við Atlantic Airways um leiting & bjarging. Greitt varð frá, at sáttmálin var ógreiður, og at tað kundi kosta mannalív.

Fiskiveiðieftirlitið vildi hava, at ásetingin í sáttmálanum um, at bjargingartyrlan skuldi verða klár innan fyri 1 tíma, skuldi verða broytt til ½ tíma, tí tá ið fólk liggja í køldum sjógvi, er tíðin umráðandi.

Sambært tíðindasendingina skuldi stjórin á Fiskiveiðieftirlitinum hava víst á, at sáttmálin um leiting & bjarging var illa orðaður.

Landsgrannskoðanin spurdi í oktober 2007[8] Fiskimálaráðið hvat var hent í málinum um at dagføra sáttmálan.

Fiskimálaráðið svaraði í juli 2008, at arbeiðið at gera nýggjan sáttmála *"er ikki farið í gongd. Verður væntandi sett í verk í vár. Tað krevur, at Innlendismálaráðið og Fiskimálaráðið í felag gera ein leist at arbeiða eftir"*. Tó høvdu Atlantic Airways og Fiskimálaráðið havt tveir fundir um at dagføra sáttmálan um Bell 412. Síðsti fundur var 17. januar 2007. Nakað var ímillum partarnar, so torført var at siga, nær dagføringin varð liðug.

Í viðmerkingum í apríl 2008 til upprit Landsgrannskoðaninnar frá 4. oktober 2007 sigur Løgmálaráðið, at ráðið umhugsar at siga sáttmálan viðvíkjandi millumoyggjaflúgving upp til 1. juni 2008 við virknað frá 1. januar 2009. Ráðið hevur í hesum sambandi tosað við Fiskimálaráðið við atliti at samskipa báðar sáttmálarnar.

## 3.6 Arbeiðsskrá hjá bjargingartyrluni

Sambært fylgiskjali 1 til sáttmálan millum Fiskimálaráðið og Atlantic Airways skal arbeiðsskrá verða gjørd aðru hvørja viku fyri 3 vikur fram, soleiðis at MRCC-støðin altíð veit, hvar Bell 412 tyrlan er. Arbeiðsbólkurin, sum ger arbeiðsskránna, er settur saman av umboðum fyri Vaktar- og Bjargingartænastuna, Fiskiveiðieftirlitið, Atlantic Airways og tilbúgvingarverkið.

Sambært fylgiskjalinum skal arbeiðsbólkurin eisini gera upp, hvussu nógvar minuttir tyrlan er brúkt, síðani bólkurin seinast var saman. Sambært ársfrágreiðingini í ársroknskapinum 2006 hjá Atlantic Airways varð bjargingartyrlan kallað út 37 ferðir í 2006.

Landsgrannskoðanin hevur í skrivi í oktober 2007 spurt, hvussu nógvar tímar "bjargingartyrlan" (Bell 412)

1. hevur verið á flogi í 2005 og í 2006
2. hevur verið nýtt í 2005 og í 2006 til:
   - leiting,
   - bjarging og
   - fiskiveiðieftirlit,

   sammett við teir árligu 170 blokktímarnar, sum avtalan fevnir um (bólkað á leiting og bjarging, venjingar og fiskiveiðieftirlit), og hvussu nógv hon hevur verið nýtt til millumoyggjaflúgving og chartur.

[8] Fylgiskjal 4, sp. 8)

ad. 1) Fiskimálaráðið hevur ikki svarað spurninginum, men vísir ístaðin í juli 2008 til Atlantic Airways.

ad. 2) Fiskimálaráðið sigur í juli 2008, at MRCC førir bert yvirlit yvir samlaðu nýtsluna fyri báðar tyrlurnar.

Landsgrannskoðanin hevur harafturat spurt, hvørja ávirkan tað hevur á tilbúgvingar-ætlanirnar hjá t.d. MRCC-støðini, at Bell 412 tyrlan verður leigað út til frálandavinnu uttanlands, og hvørja ávirkan tað hevur á tørvin á venjingum, at Bell 412 tyrlan hevur verið so nógv í rakstri, sum hon hevur, farnu árini.

Fiskimálaráðið sigur í juli 2008 at tey meta, at bæði Bell 212 og Bell 412 skulu hava støð í Føroyum. Annars hevur Bell 412 bara verið leigað av landinum eitt styttri tíðarskeið á sumri 2007 og í tí ítøkiliga førinum hevði tað onga ávirkan.